# Fremmant gjaldoyra

**MANNAGONGD**

**Skráseting av flytingum í fremmandum gjaldoyra í FSL**

Ein kann nú skráseta flytingar í fremmandum gjaldoyra mánadag til og við hósdag.

Gjaldið verður skrásett, eins og eitt gjald í donskum krónum, men ein eigur at hava í huga:

1. Gjaldoyrað skal verða broytt frá "KR." til gjaldoyrað, sum talan er um.
2. Upphæddin skal verða skrásett í gjaldoyranum, talan er um, og skal ikki verða umroknað til danskar krónur.
3. Gjaldoyradagfestingin skal verða broytt til dagsdato - skipanin skjýtur upp fakturadagfesting.

Gjaldstovan skrásetur bert gjaldoyravirði, sum vanliga verða nýtt. Um tørvur er á at flyta í gjaldoyra, sum ikki er skrásett í FSL-skipanini, skal gjaldstovan hava boð um hetta. Gjaldstovan skrásetur beinanvegin umbidna gjaldoyravirðið, so tað er tøkt í skipanini.

**Serliga viðurskifti í smb. við flyting í fremmandum**
Gjøld í fremmandum gjaldoyra verða vanliga flutt seinasta arbeiðsdag í vikuni. Um serlig viðurskifti gera seg galdandi, er møguleiki fyri at flyta aðrar tíðir.

Um kreditorur er skeivt skrásettur, og úrslitið er, at tað stendst ein feilur í útgjaldskoyringini, verður ávísa útgjaldið í fyrsta umfari tikið úr koyringini, so hini gjøldini kunnu verða flutt. Feilurin verður síðani fráboðaður viðkomandi, ið hevur skrásett flytingina, við áheitan um at fáa feilin rættaðan. Sí mannagongd viðvíkjandi viðlíkhaldan av kreditor stamdátum.

**Kostnaður**
Gjaldstovan skuldskrivar stovnin fyri tað, sum bankin tekur at avgreiða flytingina.

Stovnurin verður bert debeteraður ella krediteraður fyri gjaldoyramun hægri enn kr. 1.000. Munir undir kr. 1.000 ber landskassin.

Skal stovnurin gjalda eina munandi upphædd í fremmandum gjaldoyra, og møguleiki er fyri stórum gjaldoyramuni, skal stovnurin sjálvur taka stig at gjaldoyratryggja flytingina og boða gjaldstovuni frá hesum.